# TIM -Skovlunde frá 4.-10. August 2010
## Útbreiða kærleika Guds

**Aldur** : 16-18 ár
**Stað:** Skovlunde Frikirke
**Prísur**: 800 kr. (ferðing ikki íroknað)

**Skovlunde,** er ein partur av Stórkeypmannahavn – ca. 15 km. úr centrum av Keypmannahavn. Skovlunde Frikirke er en nýggj lokal samkoma, hvørs endamál er at útbreiða kærleika Guds, soleiðis at onnur eisini verða eggjað til saman við okkum at tilbiðja Gud. Les eisini: http://www.skovlundefrikirke.dk/

Vit hava havt fleiri tiltøk fyri at gera samkomuna kenda her í nærumhvørvinum. Okkum tørvar tína hjálp til at halda á í hesum arbeiði, serliga við atlitið til at fáa samband við børn og ung. Tað er tí ein treyt at tú dugir at tosað danskt um tú ætlar tær á TIM í Skovlunde, har vit vera umleið 40 tannáringar umframt leiðarar og liðleiðarar.

Vit ætla m.a. at hava hesi tiltøk fyri børnini:

- Dukkusjónleik
- Hárflætting
- Andlitsmáling
- Tónleik
- Dans/Drama
- Hoppipútu
- Ítrótt og ymisk spøl

Fyri tey ungu kundu vit hugsað okkum at havt eitt ungdóms kafékvøld, hvar tú fært møguleikan at deila tína trúgv og tín vitnisburð við onnur ung t.d. við Drama, sangi ella tónleiki ella við at fortelja hvat tú sjálv/ur hevur upplivað saman við Gudi.

Tað verður eisini ein frídagur, har vit hugna okkum saman og uppliva okkurt spennandi í Keypmannahavn.

Hví ikki seta tíð av í summar til at breiða út kærleika Guds til íbúgvarnar í Skovlunde.

Les meira á www.teenstreet.fo









